Bilarnir í "Kringvarpsgarasjuni":

# Koreanskur luksusbilur og japanskur bestseljari

**Bilarnir sum vórðu umrøddur í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin 4. apríl vóru tveir sera ymiskir bilar: Chevrolet Epica og Toyota Auris**

BILAR

Í útvarpssendingini "Bylgjan" mikudagin í Kringvarpi Føroya vórðu tveir bilar umrøddir: Chevrolet Epica og Toyota Auris. Bilarnir eru í hvør sínum klassa. Chevrolet Epica er ein stórur sedan við fýra hurðum og allari hugsandi útgerð, meðan Toyota Auris, sum avloysir Toyota Corolla, er ein hatchback við fimm hurðum. Felags fyri hesar bilar er, at teir eru í so gott sum sama prísklassa.

Tað var útvarpsmaðurin Kári Sólstein, sum legði bilprátið til rættis. Hann tosaði við Sofus Hansen, bilfjepparа, og Óla Jákup Rólantsson og Magnus Gunnarsson, frá bilredaktiónunum á ávikavist Vikublaðnum og Sosialinum.

## Chevrolet Epica

Samstundis sum Chevrolet Epica er ein stórur og rúmligur luksusbilur við allari útgerð, er hann í sama prísklassa sum bilar í miðalklassanum.

Innan er alt leður og alulook. Epica líkst mest einum evropeiskum bili frá General Motors innan. Eisini at koyra við er hann sum ein evropeari hvat koyrieginleikum og komforti viðvíkur. Seks sylindraði motorurin er kvikur og hoyrist næstan ikki, og plássið í kabinuni er sum eini limousinu.

Epica fæst við tveimum ymiskum 6 syl. raðmotorum: 2,0 litur við 143 hk og 2,5 litur við 156 hk. Epica 2.0 LT kostar kr. 249.300 og 2,5 LT við automatiskum girum kostar kr. 278.900. Bíligasti Epica kostar kr. 228.800 fyri ein Epica LS.

## Toyota Auris

Toyota Auris avloysir Toyota Corolla, ið er heimsins mest seldi bilur nakrantíð.

Hóast Auris minnir um forgangarin og um Toyota Yaris, er talan um ein heilt nýggjan bil. Mest eyðsýnda designbroytingin er í kabinuni – serliga gardanboksin ið er høg, og girstongin situr nær við rattið. Ergonomiskt rætt og sera arbeiðsligt

Auris fáast við tveimum bensinmotorum: 1,4 litur við 97 hk, og 1,6 litur við 124 hk.

Dieselútgávurnar eru: 1,4 litur við 90 hk, 2,0 litur við 126 hk og 2,2 litur (Sol Sport) við 177 hk.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein 1,6 litur VVTi bensinmotori við 124 hk og kostaði kr. 234.600. Bíligasti Auris við 1,6 litur motori kostar kr. 215.600.

*mg*



*Motorurin á Chevrolet Captiva er til viðgerðar*




*Bilarnir sum vórðu royndarkoyrdir í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin Chevrolet Epica og Toyota Auris*







Sp/f Norðbil:

# Fyrsti Skoda Roomster á gøtuni

Seinasta fríggjdagin læt bilasølan Norðbil við Oyggjarvegin sín fyrsta Skoda Roomster út av húsinum. Roomster er ein heilt nýggjur rúmligur familjubilur til fimm persónar.

Í myndini sæst Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil handa blómutyssi til eigaran Heðin Poulsen á Skála, sum saman við soninum heintaði bilin, ein Roomster 1,6 Sport. Heðin sigur, at hann seinastu sjey árini hevur koyrt við einum Skoda Octavia, sum hann var sera væl nøgdur við.